


Høvuðsskrivstovun hjá Statoil á Forus, uttanfyri Stavanger. Mynd: Øyvind Hagen/Statoil

# Statoil selur høvuðsskrivstovuna fyri 2,2 milliardir krónur

Deil:



**Jógvan Hugo Gardar**

13.06.2015 - 10:06

Oljan.fo

Norska oljufelagið Statoil hevur gjørt avtalu við Colony Capital um at selja teimum høvuðsskrivstovuna hjá oljufelagnunm á Forus, uttanfyri Stavanger.

Sambært Stavanger Aftenblad er søluprísurin um 2,5 milliardir norskar krónur, svarandi til millum 2,1 og 2,2 milliardir danskar krónur. Samstundis ger Statoil langtíðarsáttmála uppá 15 ár um at leiga bygningarnar.

Statoil er í gongd við at byggja út høvuðsskrivstovuna, og sum skilst eru nýggju bygningarnir ikki við í søluni.

Bygningarnir sum nú eru seldir, og leigaðir aftur, eru bygdir út í fleiri umførum síðani fyrsta byggistig var liðugt í 1979. Talan er um meir enn 100.000 fermetrar